## DAGSINS MEINING

# Tvíhalda um valdið

Søguna um Jørgen Niclasen kennir helst hvørt mansbarn í Føroyum eftir ta nógvu umrøðu, sum hevur verið í miðlunum seinastu tíðina. Vit kunnu so aftaná halda fram við at geva hvørjum øðrum skyldina, at hetta endaði so. Neyvan fer semja at vera um hetta málið nakrantíð.

Men tað, sum mong tó høvdu roknað við: at málið fór at fáa avleiðingar fyri samgongusamstarvið, fer neyvan at henda. Og tað átti ein og hvør eisini at vitað frammanundan, at tað fór tað ikki at fáa. Tá hugsað verður um, hvussu vánaligt stevið hevur verið millum báðar stóru samgonguflokkarnar, og teir kortini halda saman, tá er bert at staðfesta, at hesir flokkar og leiðarar teirra hava gjørt av einaferð med alla, at teir skulu varðveita maktina, kosta hvat tað kosta vil - eitt, tvey ella trý ráðharrahøvd ella fyri tað fýra ella fimm. Sum ein vissur maður segði herfyri: alt er betur enn tað svarta sambandið. Ja tá vit síggja tingmannin Tórbjørn Jacobsen hálsfevna Óla Breckmann, sum hann annars áður hevur ynskt, har piparið grør, so ber alt til í politikki.

Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal tykjast at hava eina fjalda agenda. Fyri tað fyrsta hava hesir báðir læst teir smærri flokkarnar fastar til sín og harnæst hava teir so saman givið hvørjum øðrum trúnaðareið. Uttan mun til um ein slík tvíhaldan um maktina og tilsíðusetan av demokratisku spælireglunum er til gagns fyri landið og fólkið ella ikki, so tykjast hesir at vera óatskiljandi. Eitt skiftið tosaðu teir als ikki saman. Hvussu verður nú! Hvussu leingi skal Føroya fólk líða undir, at tveir floksleiðarar leggja størri orku í at varðveita valdið enn at vilja landsins besta!

Formaður Tjóðveldisfloksins, sum er ein fyrsta floks taktikari, dugdi eisini at tackla hesa annars torføru støðuna. Hann tónaði reint flagg og gjørdi støðu sína púra greiða, tó væl vitandi, at løgmaður hevði einki val annað enn at góðtaka avhøvdingina av landsstýrismanninum og haraftrat at halda fram í samgongu við avrættaran. Hví skuldi hetta broytt nakað í samgonguni! Fyri Kallsberg og Hoydal er tað mest umráðandi at kunna varðveita maktina, og kann nakar siga teir ringar fyri tað! Jú. Tí tað er ikki í anda demokratisins bara at vilja halda fast um maktina fyri maktina skuld, tá so nógv bendir á, at tað er ikki fyri landsins besta, at henda samgongan heldur fram. Tað hava vit sæð undir fíggjarlógarviðgerðini, og tað fara vit at síggja aftur og aftur komandi mánaðirnar, tá tað veruliga fer at sansa at úti í samfelagnum. Her hugsa vit ikki minst um sera vánaligu handfaringina av heilsuverkinum, har tú øðrumegin tosar um at viðgera fleiri sjúklingar heima í Føroyum, og tú samtíðis skerjir møguleikarnar hjá somu sjúklingum at fáa hjálp her heima. Niðurskurðurin á Landssjúkrahúsinum er ein tikkandi bumba undir hesi samgonguni. Men tað gloyma Kallsberg og Hoydal í tráðan síni at varðveita maktina.

Jørgen Niclasen hevur helst verið Føroyum ein góður landsstýrismaður. Tað er altíð spell, tá slíkt sum hetta hendir. Men hetta er so partur av tí oftani ótespiliga politiska spælinum. Neyvan hevur nakar gloymt ta ósømuligu viðferð Signar á Brúnni fekk frá sínum egnu. Men tað var so eisini partur av tí politisku telvingini, sum tá fyrigekk.

Tað verður áhugavert at síggja, nær næsta bumban brestur í samgonguni, og hvussu mangar slíkar skulu til fyri at fáa Føroyum eina breiða stjórn. Vánaliga samgongustevið hevur nógvar fjaldar vanlukkur við sær í samfelagnum, og fyrr ella seinni fara tær at gerast meira sjónligar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Rættvísislinjan

**Óli Nølsøe**



Ja, so hava vit , alt Føroya fólk, nú upplivað, hvat Høgni Hoydal og hansara harkalið meinar um rættvísi og rættartrygd her á landi.

Linjan er løgd, siga hesir góðu menn, og tað merkir ivaleyst, at hvørja ferð fjølmiðlarnir fara at rumbla við einum máli - og tað hendir jú av og á, og í minsta lagi tá smátt er við øðrum tíðindum, ja, so skal ein landsstýrismaður skiftast út.

Fyrst var tað Signar á Brúnni, hóast púra ósekur var hann likvideraður av sínum egnu, síðani var tað Tórbjørn Jacobsen, tað var fyri tey flestu heldur lættari at skilja, og man tað helst vera eindømi í heimssøguni, at ein ráðharri hevur mist sessin av berari ófólkaligheit.

Men hví Jørgen Niclasen?

Var hetta ein tøkk fyri seinast, tá Tórbjørn Jacobsen á ólavsøku var settur uppá pláss, ella hvar skulu vit leita eftir einari nøkunlunda brúkiligari grundgeving fyri, hví Tjóðveldisflokkurin valdi at fella landsstýrismannin í fiskivinnumálum?

Onki juristarí vóru boðini frá Hoydal, hóast orsøkin til støðu Tjóðveldisfloksins júst var frágreiðingin frá kanningarstjóranum, sambært sama Hoydal, og sambært sama Hoydal, hevur úrslitið hjá kanningarstjóranum púrt einki við støðu Tjóveldisfloksins at gera. Skilji tað hvør ið vil.

Ilt er sostatt at finna útav, um kanningin var, ella ikki var, orsøkin til støðu Tjóðveldisfloksins.

Kjarnin í málinum er ivaleyst tann, at Tjóðveldisflokkurin longu hevði avgjørt, at nú skuldi landsstýrismaðurin fellast, hóast einki var at fella hann uppá, og kom hetta eisini týðuliga fram í røðuni hjá Heina O Heinesen, sum var so óheppin at siga tað hart, at hann gjarna vildi fella landsstýrismannin, men helt tó at hetta var ikki rætta høvið at gera tað.

Hvat ilt hevur so Jørgen Niclasen gjørt tjóðveldismonnum? Svarið er – onki! Hann hevur einans á lógligan hátt tikið avgerð í einum máli, sum kom rækjuskipaeigarum og øllum Føroya fólki annars til góðar.

Eisini tjóðveldismonnum.

Eg vil til seinast at nýta høvi at takka Jørgen Niclasen fyri tað megnar arbeiði hann hevur gjørt í fiskivinnumálaráðnum, og vónandi síggja vit hann aftur í hesum starvi, sum hann eftur órøttum bleiv noyddur at siga frá sær.

# At koyra 200 km/t í Vágatunnlinum er ikki verri enn eitt víkiskyldisbrot!!

**Heri Simonsen**
*ferðslulógaroffur*

Stutt og bersøgið lesarabræv fyri egna rokning. Jú eg endurtaki: At koyra 200 km/t í Vágatunnlinum er ikki verri enn eitt víkiskyldisbrot!! Og hvat grundgevi eg tað í, jú í nýggju famøsu ferðslulógini frá 1. juli 2000. Ferðslulógin frá 1/7 - 2000 síðustillar revsingina fyri tað, sum verður gjørt upplagt, við beráddum huga og við fríum vilja, t.d. tað at koyra 150-200 km/t ájavnt við revsingina, har fólk fremja víkiskyldisbrot við óvilja og óttilætlað við 15-20 km/t. Bæði brotini verða á jøvnum føti drigin í rættin, og í báðum førum verður talan um somu revsing: bót og at missa koyrikortið treytað. Tilkomnu bilførarnir og ferðglaðu unglingarnir koma at sita lið um til undirvísing hjá koyrilæraranum, og gita hvør hevur betri møguleika at klára teoriina: tann, sum júst hevur verið upp í teori, ella tann, sum var uppi í eini gamlari teoribók fyri 15, 20, 30....árum síðani? Ferðglaðu unglingarnir kunnu fara flennandi avstað tí teir fáa ein nýggjan kjans at koyra 200 km/t, tí vanliga gera teir hetta upp í 200 ferðir, áðrenn tað eydnast løgregluni at fáa klørnar í tær. Samstundis krevur ákæruvaldið, at eg og onnur, ið hava gjørt eitt óvilja brot undir arbeiði, í fólksins tænastu skulu fáa somu revsing. Hetta er himmalrópandi órættvíst!!

**Løgtingslimir mugu vakna!!**

Løgtingslimirnir, ið sótu setina 1998-2002 snorksvóvu - allir 32 - tá teir rulláðu ferðslulógina ígjøgnum 32-0! Nú er stundin komin at geva Føroya fólki eina nýggja, rættvísa ferðslulóg, sum revsar brot, ið eru burtur úr vón og viti harðari, enn tey, sum er gjørd í ósketni. Løgreglufólkini eg havi tosa við - undantikið hann, ið var við til at gera ferðslulógina! - siga, at tey ynska eina lóg, sum slær hart niður á hasardkoyring og rúsdrekkakoyring, og heldur gevur óvilja ferðslubrótarum ein eyka møguleika.

Tíverri fylgir ákærin í ferðslumálum ikki tropp í hesum. Hon segði m.a. við eina víkiskyldis-"brotskvinnu": "Det som du har gjort er meget værre, end f. eks. hvad de gør, som kører 150-200 km/t, for de ved hvad de gør! Du vidste ikke hvor alvorlig en færdelslovovertrædelse du gjorde når du ikke holdt din vigepligt!". Skal hon sleppa at halda fram við hesum ómoralska ójavnanum?

LØGTINGSLIMIR, STEÐGIÐ HESUM ØRSKAPINUM!!

P.S. Í okkara grannalondum hava bilirnir eisini víkiskyldu fyri eini súkklubreyt umframt høvuðsvegin, tað er ein sera týðandi og avgerandi munur millum Føroyar og t.d. Keypmannahavn, tí er ikki upplagt at hava "danskar tilstandir" viðv. revsingum fyri víkiskyldisbrot!


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.







*- Skulu útróðrarmenn fáa meira burtur úr fjarasildini, noyðast teir helst at arbeiða hana sjálvir, sigur vinnulívsmaður, sum hevur røtur í sildaframleiðslu.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Ikki so einfalt við sildini

**- Føroyingar fara neyvan at lata sild í gløs aftur, tí tað fer ikki at loysa seg. Fyritøkurnar, sum virka sild í dag, eru velduga stórar. Skulu teir, ið veiða fjarðasild, fáa meira burtur henni, noyðast teir helst at taka málið í egnar hendur, sigur vinnulívsmaður, sum hevur røtur í føroyskari sildaframleiðslu**

SILD
*Vilmund Jacobsen*

Tað er einki, sum bendir á, at føroyingar fara at meirvirka sild aftur, soleiðis at føroyska sildin kann kappast við útlendsku sildina á heimamarknaðinum - og úti í heimi, um tað skal verða. Orsøkin er, at hetta fer snøgt sagt ikki at loysa seg. Vit verða ikki kappingarførir. Í Føroyum eins og í øðrum londum er brúkarin at sær komin og fer ikki at keypa eitt glas av føroyskari sild - bara tí, hon er føroysk.

Hetta sigur ein vinnulívsmaður, sum Sosialurin hevur tosað við.

### Stórar verksmiðjur

- Í Danmark eru flestu verksmiðjur, sum virkaðu sild í gløs, afturlatnar og stóra svenska fyritøkan, ABBA, hevur yvirtikið meginpartin av tí, ið eftir er.

Vinnulívsmaðurin vísir á, skal tað loysa seg at virka sild í gløs, er neyðugt, at fyritøkan er velduga stór og effektiv, og tað er óhugsandi, at ein slík fyritøka verður reist á føtur í Føroyum.

Hann vísir á, at gongdin úti í heimi er hon, at fyritøkur spesialisera seg at arbeiða stórar nøgdir við lítlum vinningi fyri hvørja eind.

- ES gerst meira og meira ein marknaður, har tað ræður um at framleiða so nógv og so bíliga sum gjørligt av eini ávísari vøru, og her hava vit í Føroyum smáar møguleikar við sildini sum matvøru.

Men, sigur hann:

- Vit eru kappingarførir á øðrum økjum, og tað er her, vit eiga at nýta okkara orku og okkara skil.

- Soleiðis, sum støðan er, loysir tað seg betur samfelagsliga at landa sildina fyri 1 kr./kg. til Havsbrún í Fuglafirði, sum síðan virkar hana til laksafóður, tí hetta er eitt av økjunum, har vit eru kappingarførir. Vit ala laks og virka hann til ymiskar vørur, sum vit tjena pengar uppá.

Vinnulívsmaðurin sigur, at tað er einki til hindurs fyri at virka sild í gløs í Føroyum, men trupulleikin er, at vøran verður ikki kappingarfør. Tí vil heldur eingin gera tær íløgur, ið eru neyðugar.

- Tú ført ikki fólk í dag at keypa eina føroyska vøru, sum er tvífalt so dýr, sum tann útlendska, ið kanska eisini er líka góð ella betur.

Hann heldur, at føroyingar sjálvsagt eiga at leggja seg eftir teimum framleiðslum, sum eru kappingarførar og geva pengar.

- Tað hevði eisini verið absurd at tikið fólk úr øðrum vinnum, ið geva nakað, yvir í eina sildavinnu, sum ongar møguleikar hevur.

### Aðrir møguleikar

Teir, sum fiska fjarðasild, noyðast tí sum er at kappast við tey stóru nótaskipini, sum fiska velduga stórar nøgdir, ið verða landaðar til ídnað í Fuglafirði, og tað sigur seg sjálvt, at her eru møguleikarnir ikki stórir.

- Tað er sildin hjá nótaskipunum, sum ásetir prísin, og hendan prísin noyðast eisini teir at liva við, sum fiska fjarðasild.

Vinnulívsmaðurin heldur tó, at onkur vegur er at ganga hjá teimum sum veiða fjarðasild.

Hann heldur, at hesir kundu roynt at heilsaltað hana sjálvir, eftir at hon er avhøvdað og magadrigin. Ein annar møguleiki er at heilfrysta sildina og selja hana til eitt nú Ruslands, Afriku og Fjareystur.

- Um so varð gjørt, høvdu teir helst fingið meira enn ta einu krónuna fyri kilo, sigur hann.

Vinnulívsmaðurin vísir á, at sild er kompliserað at fáast við, og haraftrat noyðist tú altíð at ganga undir nøkur dygdarkrøv, bæði úr ES, men eisini úr eitt nú Ruslandi.

- Verður handfaringin røtt, ber ivaleyst til hjá teimum, sum veiða sild inni á firðunum, at sleppa av við hana fyri ein frægari prís enn tann, vit kenna í dag, sigur hann at enda.